**1906 - 2006** EIN ØLD SÍÐAN
**ALZHEIMERSJÚKAN** VARÐ UPPDAGAÐ

**100**
-ÁRA TÍÐARSKEIÐ




# Altjóða Alzheimerdagur

21. septembur 2006

**1906**
Alzheimersjúkan verður uppdagað

**Tey næstu 50 árini**
Ein sjálvsøgd broyting av at eldast

**1960-árini**
Alzheimersjúkan verður viðurkend sum sjúka

**1970-árini**
Vísindaligi áhugin fyri Alzheimersjúkuni vaknar

**1978**
Fyrsta Alzheimerfelagið verður stovnað

**1980-árini**
Granskingin avmarkar seg til at kanna blettir og fløkjur í heilanum

**1990-árini**
Eitt risalop frameftir

**1992**
Týdningarmikið vandaevni funnið

**1997**
Fyrsti heilivágurin verður atkomiligur

**2000**
Neyvari avmynding av tí livandi heilanum

**2001**
Føroyska Alzheimerfelagið stovnað

**2004**
Nýggjur heilivágur góðkendur

**2006**

## 1906 - 1999 „Í gjár“

**1906**
Dr. Alois Alzheimer, ein týskur neurologur og psykiatari, lýsir sjúkuna, sum seinni kom at bera navn hansara: ein líðandi nervakyknu-oyðileggjandi heilasjúka við ongari kendari orsøk ella heilsubót.
Tá ið hann kannaði heilavevnaðin á einum sjúklingi gjøllari, varnaðist hann broytingar í vevnaðinum, ið mintu um blettir og fløkjur, ið eru sermerki fyri Alzheimersjúkuna.

**1960-árini**
Avdúkingin av einum sambandi millum kognitiva viknan (minnisviknan) og nøgdina av blettum og fløkjum í heilanum fær læknavísindina til at enda at viðurkenna Alzheimersjúkuna sum eina „sjúku“ og ikki bara sum eina sjálvsagda fylgju av at eldast.

**1970-árini**
Vísindalig framstig skapa nýggj amboð, tøkni og kunnleika fyri granskingina og vitanina um mannakroppin. Sjúkan gerst áhugaverd fyri vísindaliga gransking.

**1980-árini**
Granskararnir kýta seg at kanna evnafrøðina í teimum eitrandi proteinunum, ið vórðu eyðmerkt sum „amyloid“ í blettunum og sum „tau“ í fløkjunum. Hendan granskingin hevur stuðlað undir tað arvfrøðiliga (genetiska) frambrotið í 1990-árunum.

**1990-árini**
Toymi av vísindamonnum uppdaga arvfrøðilig sambond til Alzheimersjúkuna.

**1992**
Tað fyrsta veruliga arvfrøðiliga sambandið til sjúkuna er avdúkað: Ein ílega, ið bregður frá (muterað gen), sum finst aftur í meirlutanum av familjum við Alzheimersjúku, og sum økir um vandan fyri at fáa sjúkuna.
Hóast hetta slagið av sjúkuni er sjáldsamt – á leið 7% av fólki við Alzheimersjúku – so er tað ein avgerandi avdúking.

**1993**
Leikluturin hjá apoE íleguni í heilanum verður ávístur

**1997**
Tann fyrsti heilivágurin – kolinesterasutálmari – kendur undir navninum Aricept, kemur á marknaðin sum ein heilivágur, ið lættir um sjúkueyðkennini hjá persónum við lættari til moderata Alzheimersjúku. Tveir aðrir kolinesterasutálmarar, Exelon og Reminyl, komu so aftrat tey komandi árini sum alternativir viðgerðarmøguleikar.

**1999**
Tann fyrsta Alzheimersjúku vaksinan verður ment og roynd á mýs – eitt avgerandi framstig. Arbeiðið við vaksinum heldur fram og gevur góðar vónir.

## 2000 - 2005 „Í dag“

**2000**
Tøknilig framstig í avmynding gevur nýtt innlit í tann livandi heilan. Myndir vísa, at broytingar kunna koma fyri í heilanum, langt áðrenn persónurin vísir tekin upp á Alzheimersjúku.

**2004**
Eitt nýtt evni, ein „NMDA-reseptorblokkari“ – Ebixa – ætlað til at viðgera fólk við moderatum til tungum sjúkueyðkennum upp á Alzheimersjúkuna, kemur á marknaðin. Kanningar vísa, at Ebixa stabiliserar og seinkar afturgongdini av teimum kognitivu funktiónunum.

## 2006 og framyvir „Í morgin“

**Vit fara at finna svarini**

Vit hava tikið stór lop fram ímóti at basa Alzheimersjúkuni í teimum báðum júst farnu 10-árunum. Gjøgnumbrot – so sum vaksinur, nýggir heilivágir og viðgerðir, nýggj diagnostisk amboð eru í sjónarringinum.

**Granskararnir eru vónríkari enn nakrantíð áður**

Men skuldi tað ikki eydnast at basa sjúkuni, fer talið av persónum við Alzheimersjúku at økjast ógvisligt tey komandi árini um allan heimin.

WWW.ALZHEIMER.FO

Alzheimerfelagið